## Grillbúffar til festivalfólki



- Vit steikja so leingi, fólk eru svang. Her er ríkiligt til, so tað er onki at stúra fyri, lovaðu teir báðir kokkarnir Jógvan Heinesen og Billy Petersen, sum aftur í á hildu Summarfestival í royki og dampi frá frálíku grillaðu búffunum.

Væl hýrdu kokkarnir høvdu gjørt seg út standa við grillirnar til tann ljósa morgun og út í eitt, um tað skuldi verða. Í ár høvdu teir fingið sær eitt telt at hava festivalkøkin í, sum jú vísti seg at vera eitt sera skilagott hugskot. Og alt bendi á, at teir komu at standa leingi. Longu seinnapartin fríggjadagin høvdu rættiliga nógvir av festivalgestunum latið seg lokkað av góða matroykinum. Og tað var heldur ikki hvat sum helst, tey fingu á tallerkin. Líktist mest hotellmati, og sambært kokkinum kallaðist høvuðsrætturin onki minni fínt enn: enskur búffur við eplabátum og hvítleyksauté við marineraðum gularótum og grønum bønum ... og eina deiliga, kalda sodavatn afturvið ...

## Tann Stóra Skinnúlpan



*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Sjónvarpslýsingar hava seinastu vikurnar bygt spenningin upp, heimsnavnið "Tann Stóra Skinnúlpan" skuldi á pallin á Summar Festivalinum, og hon var beinleiðis upphiting fyri Brian McFadden. Tað var eisini greitt, at tann stóra ikki kom einasmøll, hinar úlpurnar vóru við, og tær fóru at bjóða ektað playback.

Nógv troðkan var framman fyri pallin, tað vóru serliga tannáringar, summir av teimum vildu ivaleyst tryggja sær pláss til Brian McFadden konsertina, men eingin ivið var um, at hesa løtuna var tað Úlpan, sum var samrøðuevnið, herrópini "Úlpan! Úlpan!" rungaðu um festivaløkið longu áðrenn fyrsta úlpan kom á pallin.

Byrjanin av framførsluni var eitt sindur løgin, ein fyri og onnur eftir komu úlpurnar á pallin, tó vóru tær ljóðleysar inntil ein pannubandsúlpa settist á eina kondisúkklu, og súkklaði ljóði í gongd og við úlpudancetónleikinum brakandi úr hátalarunum, kom hon endiliga á pallin: "Tann Stóra Skinnúlpan",og hon legði festivaløkið fyri sínar føtur.

Við herligum dansi og dansivinarligum tónleiki fingu Úlpurnar veruliga lív í fólkið, eina løtu mest, sum kókaði tað framman fyri pallin. Men so var tað av, og friður valdaði, úlpurnar vóru farnar aftur til Úlpuland.

# Kjekkað Anne Linnet



*Ein túr aftur í 70ini í tíðina saman við gentubólkinum hjá Anne Linnet "Shit og Chanel" bleiv tað eisini til við kenda lagnum "Smuk og deilig"*

**Ein sera væl uppløgd og kjekkað Anne Linnet borðreiddi við nøkrum av vakrastu sangperlunum frá síni longu tónleikakarrieru. Støðið var høgt, men náddi samstundis út í hvønn krók á Summarfestivalinum**

SUMMARFESTIVAL
*Anna v. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Garvaða dáman í danska popprokkheiminum, Anne Linnet, hevði í øllum førum tveir stórar fyrimunir á Summarfestivalinum. Hon er super professionell, og henni nýtist ikki at júka nakran um at syngja við. Tað gera fólk av sær sjálvum. At løgini eru frálík og tekstirnir eisini hava rættiliga nógv uppá hjarta gjørdi tað heila ikki verri. Undir slíkum umstøðum kann tað næstan ikki ganga galið. Og tað gjørdi tað sanniliga heldur ikki.

### Null kiks

Hóast regnið treiskaðist nakað illa í løtum, órógvaði tað ikki vælhýrdu áhoyrarnar, sum tóktust st duga meginpartin av sangunum hjá Anne Linnet uttanat. Við eini røð av teimum væl kendu sangunum kryddað við løgum úr nýggjastu fløguni, náddi Linnet út í hvønn krók á stóru fólkamongdini í Vágsbøi. Tað var eitt sindur ringt at meta um, hvør aldursbólkur fjaldi seg undir mongu paraplynum hesa løtuna, men vit kunnu altíð gita, at tey flestu vóru hinumegin tey 35-40. Samstundis hevði ein skjót meting skjótt staðfest, at fleiri av teimum, sum sungu harðast, ikki kunnu hava verið serliga gomul, tá onkur av hittunum hjá Anne Linnet vóru í hæddini.

Trýmannað bólkurin á pallinum legið út við kenda lagnum "Time og dag og uge" við teksti eftir Johannes Møllehave. Og longu hetta fyrsta lagið prógvaði, at Linnet bara gevur seg í slíkt, hon hevur fullkomið tamarhald á og ikki loyvir pláss fyri kiksum. Burtur vóru høgu tónarnir í niðurlagnum - nakað ein kortini ikki skuldi hildið var neyðugt, tí røddin hjá Linnet er avgjørt ikki viknað við árunum. Næsta lagið "Hun fletter sit hår" var eisini eftir mínum tykki tað mest hugtakandi, bólkurin spældi av nýggju fløguni, sum kemur út í oktober. Tungu melankolsku rútmurnar vóru rættiliga eyðkendar fyri góða, gamla Anne Linnet stílin og hava uttan iva um ikki landaplágu so oyrafangandi potentiale.

Inn í millum løgini hugleiddi Anne Linnet um innihaldið í tekstunum. Eitt nú i næsta sanginum, sum sambært Anne Linnet snúði seg absolutt onki og samstundis eitt tað torførasta yvirhøvur - at nullstilla seg sjálvan og bara vera til her og nú. Klárar man tað, ja so hevur man rakað kensluna í "Søndag i april".

### Hóskiliga óhóskandi

Ongin Anne Linnet konsert uttan "Tusind stykker". Og fyri ein ordans skyld fingu vit eisini søguna um, tá ein svenskari ringdi til Anne Linnet og spurdi, um hann kundi sleppa at geva sangin út á svenskun. Restina av søguni kenna tey flestu, og nú vita tey so eisini, at tað also ikki er Bjørn Afzelius, sum er upprunamaðurin til kenda lagið "Tusind bitar". Næstu minuttirnar kundi Anne Linnet uttan iva eins væl havt sløkt mikrofonina, tí sangurin frá áhoyrarnum doyvdi næstan alt annað. Sveiggjandi paraplyirnar vóru eisini besta tekin um, at áhoyrarnir løgdu líka í, hvar regndroparnir raktu hesa løtuna.

Ein túr aftur í 70ini í tíðina saman við gentubólkinum hjá Anne Linnet "Shit og Chanel" bleiv tað eisini til við kenda lagnum "Smuk og deilig". Meðan øll hini løgini á framførsluni høvdu okkurt universielt yvir sær, tóktist "Smuk og delig" at vera merkt í so nógv av tíð og stað til at kunna raka beint á Summarfestivalinum. Tó so, við sanginum fekk Anne Linnet eisini flættað inn eina áhugaverda søgu um byrjanina til gentubólkar og afturljóðini, teir góvu, á donskum tónleikapallum í 70unum.

Kanska júst tí hvørkið verðrið ella árstíðin hóskaði serliga væl, valdi Annet Linnet at enda framførsluna við lagnum "Forårsdag". Soleiðis fekk hon nevniliga eisini mint á, at tað stórfingna við tónleiki netupp er, at hann gevur okkara tankum fríar teymar og lovar hvørjum einstøkum at legga sín heilt egna týdning í lag og tekst.